gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Bíða ella kalla tingið saman harra løgmaður

### *Oddagrein*

Tað er ikki bara sum at siga tað at vera landsstýrismaður í dag. Hetta mugu vit sanna eftir málið um Signar á Brúnni.

Signar á Brúnni sigur seg ikki hava gjørt annað, enn fakkunnleikin hevur mælt honum til. Vit skulu á hesum stað ikki leggja hann undir nakað annað, men vit mugu bara staðfesta, at stýrisskipanarlógin varð brotin - og tí mátti landsstýrismaðurin fara frá.

Tó so. Hansara egnu vildu hava málið kannað - og tað í sjálvum sær kann so ikki gera støðuna verri - hvørki fyri Signar á Brúnni ella fyri tey, ið siga nakað annað.

Men málið fekk eina heldur løgna vend næstseinasta fríggjadag, tá partamenn hansara góvu honum endaliga sparkið - bert fáar vikur áðrenn kanningarstjórin handar løgtingsformanninum frágreiðingina um málið.

Vit kunnu heldur ikk i annað enn geva bæði formanninum og virkandi formanninum í fíggjarnevndini rætt, tá teir greiða frá mannagongdini við eykajáttanum í fíggjarnevndini.

Tá nevndin hevur ta siðvenju, at slík mál skulu fyri tingið - soleiðis sum stýrisskipanarlógin fyriskrivar - so er ikki meira at tosa um. Hvør er trupulleikin í at kalla tingið saman?

Tann altíð so atfinningarsami advokaturin, Bjørn á Heygum, var løgið nokk í parti við landsstýrinum hesaferð. Tað er eisini undrunarvert, hví hann í hesum máli ikki heldur seg til »greiðu linjurnar«, sum hann annars altíð er so skjótur at gera vart við…!

Tað tykist nú eyðsæð, at talan er um eitt innanhýsis stríð í Tjóðveldisflokkinum, sum nú endaliga er avgreitt. Men tá landsstýrið ikki bað um hesa játtan, tá eykajáttanaruppskot vóru fyri í tinginum bæði í apríl og maimánaði - hví hevur málið so fingið bráskund nú? Hvar er logikkurin!

Ivi er nú eisini reistur um arbeiðsháttin hjá Helenu Dam á Neystabø. Vil løgmaður sleppa undan slíkum trupulleikum, so er bert at halda seg til tað, ið skrivað stendur: Bíða, ella kalla tingið saman

*Sosialurin*

# Ad Libitum givið út fløgu

Eirikur Lindenskov

Nýggj fløga við gomlum upptøkum hjá Ad Libitum er útkomin.

Tað er plátuhandilin HCW Tórgarð, ið gevur út fløguna, sum er endurútgáva av bandinum sum kom út í 1983.

Finnbogi Johannessen, sum hevur arbeitt við útgávuni, sigur, at tey í útvarpinum hava gjøgnumgingið gomlu upptøkurnar, sum nú eru nógv klárari, tá tær verða spældar av fløgu.

Í fjør kom eisini út fløgan við Herman Jacobsen og í næstum kemur ein triðja fløga við løgum hjá Ad Libitum út.

Bólkurin hevur nú um 25 ár á baki, men teir eru tó ikki so virknir, at teir javnan spæla.

– Vit eru komnir nakað til árs - aldurin er frá 50 og uppeftir, so vit leggja okkum mest eftir at geva út tónleikin hjá okkum, sigur Finnbogi Johannessen.

Manningin í bólkinum er enn tann sama, tó at Poul Engberg er deyður.

Á fløguni hjá Ad Libitum eru verk eftir Bach, Schubert, Copin, Mozart o. ø. Hetta er lættur klassiskur tónleikur, útsettur fyri mandolinir og guittarar. Í ár eru annars 250 ár liðin síðani Bach doyði.

Ad Libitum varð serliga kent í teimum mongu V4 undirhaldssendingunum í útvarpinum.




*Fløguhúsin lýsir innihaldið í fløguni. Høgrumegin spæst gamli húsin*

## Fimta og síðsta gongulagskappingin

Um vikuskiftið 22. - 23. juli skipar Føroyskt Íslandsrossafelag fyri fimtu og síðstu gongulagskapping í ár. Higartil í ár hevur luttøkan verið góð. Umleið 30 ross hava luttikið í hvørjari kapping, og vónandi verða eisini nógv ross við í hesi síðstu kappingini.

Byrjað verður leygardagin 22. juli kl 10 við kapping í skeið og trav á vøllinum hjá Føroya Ríðingarfelag, og hildið verður áfram við kappingum kl 14 uppi á vølli felagsins við Kráarheyg.

## Stuðul til orðabókagerð

Til at stuðla teimum fámentu málunum í Norðurlondum játtar Norðurlendska ráðharraráðið stuðul til orðabókagerð. Í 2000 er hesin stuðul 800.000 kr. Fámentu málini eru í hesum sambandi føroyskt, grønlendskt, íslendskt, sámiskt og finnlandssvenskt. Fólk, sum arbeiða við føroyskum orðabókum, einmálsligum ella tvímálsligum, ella sum ætla sær undir tílíkt arbeiði, kunnu sostatt søkja um stuðul. Í umsóknini eigur verkætlanin at vera væl lýst, eitt nú eigur nágreiniliga at verða mett um arbeiðstíð og kostnað. Neyðugt er ikki, at verkætlanin verður liðug í ár, men best er, um hon byrjar í ár. Umsóknarfreistin er 1. august.

Tað er Málráð Norðurlanda, sum umsitur stuðulin, og umsóknir skulu sendast við vanligum posti til:

Nordisk språkråd
Postboks 8107 Dep,
N-0032 Oslo
Ella við telduposti til:
hauge@sprakrad.no

## Minnningarorð um Anniku Gulklett

f. 23.10.74
d. 24.06.00

Góða Annika!

14 dagar eru farnir, síðan tey tungu boðini komu, at tú vart farin, og í kvøld eru vit í flokkinum savnað at minnast teg. Vit minnast aftur á farnar dagar - dagar úti í Nólsoy. Tað, vit minnast teg fyri, er títt lætta lyndi, títt vakra smíl og tín deiliga verumáta.

Vit minnast túrin í Hetlandi, hvussu øvundsjúkar vit gentur blivu, tá ið »Nonnu-kiskurnar« fóru avstað við »okkara« dreingjum. Men seinni bleivst tú sjálv ein »Nonnu-kiska«, og tað hava vit ofta flent eftir.

Sjálvt um vit ikki fóru í sama skúla eftir loknan 7. flokk, hevur tú altíð verið ein av okkum - altíð blíð og fyrikomandi. Tað er eisini soleiðis vit fara at minnast teg.

Tað er sera torført at skilja, at tú ikki ert her longur, men tað hjálpir hjá okkum at hugsa, at tú hevur tað gott nú.

**Hvíl í friði.**

**árgangur ’74 í Nólsoy**



# Hvalirnir ringja heim

*Hvørja ferð Jónhild, Katrina, Ísak og Mads Petur koma undan kavi, ringja teir heim til mammuna Dorete Bloch og fráboða, hvar teir eru. Í gjár spældu teir á Skeivabanka*

Dia Midjord

Seinasti sendarin varð festir, hvalurin bleiv snaraður og skumpaður útaftur. Bátarnir, ið hildu vakt uttanfyri, sigldu nú innum. Og grindabólkurin varð síðan rikin til havs.

Klokkan nærkaðist fýra leygarmorgunin, og Dorete Bloch og hennara fólk kundu loksins taka sær av løttum. Útgerð og serfrøðingar vóru síðan sigld á Gomlurætt, og stutt eftir var stórt morgunmatarborð hjá hvalamammuni á Velbastað.

### Ísak ikki ringt

Tað eydnaðist hvalafólkunum at festa sendarar á fýra hvalir. Ætlanin var at festa fimm sendarar, men tá tey kekkaðu sendararnar í saltvatni, vildi tann eini ikki makka rætt.

Hóast tað er meira enn nokk at hava sendarar á fýra hvalum, so er Dorete Bloch eitt sindur óttafull. Tey hava nevniliga mist sambandi við Ísak.

– Sendarin virkaði á Sandavági, men síðan hava vit ikki frætt frá Ísakki. Og tað er okkum ein gáta, hvat honum kann vera hent, sigur Dorete Bloch.

Jónhild, Katrina og Mads Petur ringja heim við jøvnum millumbili. Tað er soleiðis, at hvalirnir ringja hvørja ferð teir koma undan kavi. Sendarin, ið er festur aftarlaga á horninum, ringir umvegis ein fylgissvein til ein móttakara í Toulouse í Fraklandi.

Á djórasavninum í Havn kann so Dorete Bloch fylgja hvussu hvalirnir ferðast. Positión teirra verður staðfest í telduskipanini, tá hvalurin hevur ringt og fingið samband tríggjar ferðir.

Tá vit fyrrapartin í gjár, høvdu hvalamammuna í telefonini, hevði Ísak enn ikki givið nakað lívstekin. Hinir tríggir hvalirnir vóru á leið í ein útnyrðing úr Skeivabanka.

### Gjørdu landgongd

Av teimum 80 hvalunum, ið ein metti vóru í bólkinum, gjørdi á leið ein triðingur landgongd í ósanum báðumegin har Stórá rennur á sjógv í Sandavági. Og nú var rokan í fjøruni. Grindamenn og hvalagranskarar arbeiddu hvørt um annað av øllum alvi.

Hvalirnir máttu vendast og skumpast útaftur. Og Dorete og hennara fólk noyddust leggja sínar útvaldu á liðina, bora ígjøgnum horni og festa sendararnar. So hvørt teir vórðu avgreiddir, vórðu teir sleptir.

– Tað gekst ómetaliga væl. Og grindamenn, hjálparfólk og øll, ið hava hjálpt til, eiga stóra tøkk uppiborna. Ikki bara fyri hesa einu ferðina, men fyri allar tær mongu ferðirnar, grind hevur verið, sigur Dorete Bloch, sum nú fer í summarfrí.

Hon kann kortini ikki heilt kopla frá, tí ymsastaðni í Norðuratlantshavi ferðast fýra hvalir, ið hon hevur ábyrgdina av. Og teir skulu treyðugt enda í einum grindadrápi.

– Hvar eg enn ferðist, so havi eg telduna við. Og eingin grind verður hildin til, fyrr enn eg veit, hvar Ísak, Mads Petur, Jónhild og Katrina eru, sigur hvalamamman.




*Prikkarnir vísa hvar hvalabólkurin hevur ferðast síðan hann varð rikin út av Sandavági leygarmorgunin*



*Sendarin er festir á hornið og hvalurin verður hjálptur útaftur*

# Paul Watson á kópaferð

*Nú liggur Paul Watson aftur í Lerwick. Seinastu tíðina hevur hann arbeitt sum verji hjá kópi*

Dia Midjord

Tíðliga í gjáramorgunin kom skipið hjá Paul Watson aftur til Lervick í Hetlandi. Ocean Warrior var ein stuttan túr í Kirkwall í Orknoyggjunum, men er nú aftur í Lerwick.

Á havnaskrivstovuni í Lervick verður sagt, at lítið og einki er at frætta frá skipinum.

– Men Paul Watson hevur boðað frá, at hann ætlar sær at liggja her einar tríggjar dagar, verður sagt.

### Ikki eftirfarandi

Sambært teimum á havnskrivstovuni í Lervick, so hevur Paul Watson seinastu tíðina fingist við at verja kóp.

Hesi tíðindini eru kortini ikki váttað av Ocean Warrior, men eru minst líka eftirfarandi, sum nógv av tí, ið kann lesast á heimasíðuni hjá Sea Shepherd felagsskapinum.

Har stendur eitt nú, at Paul Watson hevur sent eitt skriv til danska forsætisráðharran Poul Nyrup Rasmussen og biðið um hjálp frá honum at steðga grindadrápi. Paul Watson skjýtur upp at hækka blokkstuðulin, um vit gevast at drepa grind.

Tá Sosialurin setti seg í samband við statsministeriet í gjár, vistu tey einki um, at Paul Watson hevði sent Poul Nyrup nakað skriv, bræv ella teldupost.

